# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Bilar

*Frásøgn er frá flogvøllinum í Vágum, ið løgreglan nýtir sum koyritekniska breyt hjá politistum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Stórt bilblað mikudagin

Mikudagin 28. oktober verður serblaðið Bilar sum innlegg í Sosialinum. Í blaðnum eru ummæli av fleiri nýggjum bilum og ymiskt tilfar um vetrarkoyring sum t.d. dekkskift, sporing og rustviðgerð.

Eisini er ein frásøgn frá flogvøllinum í Vágum, ið løgreglan nýtir sum koyritekniska breyt hjá politistum. Koyriteknikkur er ein partur av útbúgvingini hjá politinum.

Ein myndafrásøgn er frá tá umboð fyri bólkin, sum er settur av landsstýrinum til at fyrireika eina koyrtekniska breyt í Føroyum, vóru og hugdu eftir koyritekniskum anleggum í Danmark.




# Heimsins mest máttmikli elbilur

Heimsins mest máttmikli elbilur er danskur. Talan er um danski elbilin Lynx Speedster sum hevur eina toppferð upp á 200 km/t og koyrir frá 0-100km/t upp á 3,0 sekund.

Lynx Speedster hevur ikki minni enn 950 ljóðleysar hestakreftir og $CO_2$ útlátið er 0,0 gr/km.

Bilurin hevur Lithium Polymer battarí, sum eru gjørd til at kunna løðast skjótt upp, og hann kann koyra heilt upp til 350 km upp á eina løðing.

# Vetrarklárgering og píkadekk í Bilradio




*Jóhannes Tauser, leiðari hjá Tidy Car í Hoyvík*

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05 greiðir Jóhannes Tauser, leiðari hjá Tidy Car í Hoyvík, frá, hvussu teir t.d. lakkforsegla bilar, so teir eru mótstøðuførir til ein langan vetur.

Hálvan oktober var aftur loyvt at koyra við píkadekkum. Í tí sambandi verður ein samrøða við Petur Hermansen í Havn endursend. Petur arbeiðir sum sølumaður og hevur koyrt á føroysku vegunum í meira enn 40 ár. Hann er eisini kendur fyri síni avgjørdu sjónarmið um píkadekk.



*Petur Hermansen sølumaður*